# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Kári Hammer, Vági:

## – Alt hevur tíð sína

**Fríggjadagin 27. februar var móttøka hjá Statoil á Viðarnesi í Havn í sambandi við at Kári Hammer, distributørur hjá Statoil í Vági, nú legði frá eftir 36 ára tænastu**

Á móttøkuni vóru starvsfólk hjá Statoil og familja og vinir hjá Poulu og Kára Hammer.

Niels Juel Nattestad, stjóri á P/f Statoil, takkaði Kára fyri tíðina, hann hevði arbeitt fyri felagið. Hann segði m.a., at aftan fyri ein góðan mann, var sum oftast eisini ein góð kona, soleiðis var eisini í hesum føri, Poula og Kári Hammer høvdu rikið oljusøluna í Vági fyrimyndarliga. Tey høvdu verið eitt gott team.

Óli Marner Christiansen, starvsfelagið hjá Kára, í Klaksvík, segði sera skemtiliga frá fleiri ymiskum hendingum á túrum, teir høvdu verið saman uttanlands.

Til seinast segði Kári sjálvur nøkur orð, har hann siteraði Sálomo kong, har hann sigur at "alt hevur tíð sína". Soleiðis var eisini við hansara tíð á Statoil. Hann byrjaði fyri 36 árum síðan, tann 1. mars 1968, sum oljusølumaður hjá Esso, seinni Statoil, í sunnaru helvt av Suðuroy, eftir at Martin Joensen, heilsølumaður í Vági, gavst vegna aldur.

Kári segði, at hann hevði arbeitt undir 11 stjórum, og hann hevði slitið fimm oljubilar upp.

Kári ið er 67 ára gamal og føddur og uppvaksin í Vági, hann fór fyrstu ferð til skips sum 16 ára gamal. Hann er annars útbúgvin stýrimaður og skipsførari, og sigldi til hann legðist upp á land í 1968.

Kári og Poula, sum eisini er úr Vági, hava eisini í nøkur ár rikið Statoilstøðini á Vági.

Um kvøldið bjóðaði Statoil til døgurða á Hotel Føroyum.



*Niels Juel Nattestad, stjóri á P/F Statoil (h.m.) takkar her Kára Hammer fyri tey 36 árini, hann hevur starvast hjá felagnum*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Familjan var eisini við til móttøkuna. Á myndini eru Kári og Poula saman við børnum og barnabørnum. Vinstrumegin er dóttirin Majken, sum er advokatskrivari í Havn, saman við døtrunum Guðrun og Rannvá. Høgrumegin er sonurin, Petur, og konan, Jóna, sum er úr Klaksvík, tey búgva í Svøríki, har Petur er flogskipari hjá SAS. Fremst standa børnini hjá Jónu og Peturi, Barbara og Mathias*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Óli Marner Christiansen, starvsfelagið hjá Kára í Klaksvík, segði m.a. annað frá ymiskum teir høvdu havt saman*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Statoil prát. Tórur Johannesen, frá Statoil á Sandi, Ulla Mortensen, frá móttøkuni hjá Statoil, og Kári Hammer*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Kári Hammer takkar fyri seg*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Páll í Kirkjubø seksti

Einaferð kom eg at tosa við ein leigubilstjóra. Hann segði mær frá, at fyri mongum árum síðani varð hann biðin um at koyra eina jarðarmóðir til Kirkjubøar, tí ein kona skuldi eiga. Tá so er, verður ikki hugt eftir líkindum, so hann fór, hóast veðrið ikki var nakað serligt. Tey kom fram í øllum góðum, men veðrið bara versnaði og gjørdist rættilig kavaódn, so bæði hann og jarðarmóðirin lógu veðurføst í Kirkjubø, og hann slapp ikki aftur til Havnar fyrr enn triðja dagin. Men ferðin var góð í aðrar mátar, tí tann 1. mars 1944 kom ikki bert eitt barn í heimin, men tvey, tvíburarnir Páll og Tróndur Patursson.



Nógv ár eftir hetta kom Páll inn í okkara familju, við tað at hann giftist einastu systur okkara, Sølvá. Tað gjørdi at vit komu til Kirkjubøar, og hagar hava ferðirnar verið mangar og góðar. Vit hava verið saman í brúdleypinum á hásumri 1968, har veðrið var so gott, at brúdleypsdansurin varð dansaður í túninum. Vit vóru til barnadópar hjá teirra trimum synum. Dópurin hjá Jóannesi var serstakur, tí har var Jákup Joensen varabiskupur, og hann kundi siga frá, at nú hevði hann verið prestur fyri fimm ættarlið á Kirkjubøargarði. Hann hevði verið í kirkju saman við Jóannesi Paturssyni, sum hann hevði jarðað í august 1946, eins og hann hevði verið saman við Pálli Patursyni og Jóannesi hjá Pálli og hesum Pálli, og nú varð honum forunt at doypa enn ein Jóannes.

Páll himpraðist ongantíð við at taka á seg at gerast bóndi á hesum stóra garði við teimum væntanum, sum øll onnur høvdu til ein slíkan bónda.

Men eitt er at halda seg til, eitt annað er at megna eina slíka avbjóðing. Her má sigast, at hann royndist heilt ótrúliga væl. Hetta er fyrst og fremst hansara arbeiðshugi og -orku fyri at takka. Hann hevur altíð verið hegnismaður burturav. Arbeiði av øllum slagi var nakað sum hann bara dugdi. Áræði var honum í holdi borið. Var nakað galið við eini maskinu, so fór hann bara í holt við hana og umvældi hana. Var farið á fjall, so dugdi hann væl at fáa manning og fara við henni, so menn komu aftur eitt annað ár. Einaferð eg saman við einum útlendingi var á rættini, var hesin ovfarin av, hvussu raskir menninir vóru og hvussu væl teir dugdu at arbeiða. Skuldi farast í Trøllhøvdu, so var hann á odda, og tað uttan mun til um tað vóru havhestaegg, lýrar, lundafleiggj ella fjallgonga sum farast skuldi í holt við. Fiskimaður var hann góður, tá hann alt ov sjáldan hevði tíð at fara á flot. Men einki kundi fáa hann at skunda sær so nógv sum grindaboð. Hann fann sjálvur fleiri grindir, og mangar hevur hann sum grindaformaður rikið so væl, at tær ikki eru farnar aftur í havið.

Fjørðurin uttan fyri Kirkjubø er óreinur, og har er mangur bátur komin illa fyri. Tá er tað komið væl við at hava Páll á garðinum, tí hann hevur havt eyguni við øllum, og ferð eftir ferð er hann farin rennandi oman á støð, er lopin í bát og hevur bjargað mannalívum.

Á morgni og kvøldi hevur hann ambætað neytunum og hevur dugað sera væl at lagt hoyggingina til rættis sum alt annað arbeiði hann hevur tikist við.

Í hansara tíð eru stórar broytingar farnar fram í tilveruni hjá føroyskum bóndum. Tað var so fyrr, at inntøkan av einum garði var nóg mikið fyri nógv fólk, men henda inntøka er minkað so nógv, at sjálvt á einum so stórum garði sum hansara varð minni og minni eftir, eisini hjá tveimum so dugnaligum fólkum sum honum og konuni. Men ikki var hann ráðaleysur. Hann gjørdist handilsmaður afturat bóndavirkinum, tí hann fekk sær umboðssølu og seldi hegn um alt landið.

Ein annar táttur í virki hansara var at nýta teir møguleikar, sum serliga umhvørvið í Kirkjubø gevur ferðamannavinnuni. Fornminnini í Kirkjubø eru tey stórfingnastu vit hava, men onkur skal leggja so til rættis, at ferðafólk fáa eina uppliving burturúr at koma hagar. Hetta vísti Páll seg at vera óføran til. Nøkur ferðafólk hava hug til at fáa sær ein bita á hesum søguliga stað, og landsins myndugleikar halda at tað hevur týdning fyri umdømi okkara mótvegis øðrum londum, at gestir okkara síggja tað besta og mest áhugaverda, sum vit hava at bjóða fram. Hetta gjørdi at Roykstovan í Kirkjubø gjørdist eitt hugtak, men tað sum øll ferðafólkini vóru mest hugtikin av, var at hoyra Páll greiða frá um sítt heim og ta veldugu søgu, sum hetta pláss hevur í hugaheimi okkara.

At hann var framúr vertskapsmaður og góður kvøðari og fekk dansin at ganga var nakað sum eisini setti dám á í øllum teimum samkomum sum vóru í Kirkjubø.

Men fyri at kunna taka sær av gestum, er nógv sum hond skal takast í.

Her kom tað væl við, at Páll ikki bert var eitt arbeiðsgrev í haga, í bjørgum, á sjógvi og á landi, men at hann eisini var av allarbestu kokkum. Barst einum kokki frá, og gestir skuldu koma, so kundi hann altíð taka við, og alt tað arbeiði, sum gerast skuldi, dugdi hann so væl sum eingin annar. Alt tað sum var at taka upp av mati tók hann upp, uttan mun til, um tað var fiskur ella grind, slakt ella fuglur, og dugdi at nýta tað í húsarhaldinum og fyri gestum.

Tá ið gestirnir út á náttina vóru farnir, og fólk fyri lýsing komu til Kirkjubøar, so var ljós í lonini heima á garði í Kirkjubø, tí tá vóru hjúnini longu komin upp, og ruddaðu og vaskaðu alt húsið áðrenn Páll fór í fjósið.

Deknur og klokkari hevur hann verið alla sína tíð.

Mong eru tey álitisstørv sum hann hevur havt í feløgum hjá starvsfeløgnum sínum, og hansara partur lá ikki eftir tá ið Mjólkarvirki Búnaðarmanna kom í lag í 1980.

Hann var við at stovna Føroya Fornminnagrunn og hevur lagt eitt stórt arbeiði í at varðveita fornminnini í Kirkjubø.

Nú er hann haldbóndi og heilsan er farin at bila, men skal eg siga tær Pálli tøkk fyri gott vinalag í mong ár.

**Zakarias Wang**

## Tróndur Patursson 60 ár



Í dag fyllir okkara kendi listamaður, Tróndur Patursson í Kirkjubø 60 ár. Tróndur er fjølbroyttur listamaður, hann er bæði málari og myndahøggari v.m. Hann er útbúgvin í Danmark og Norra innan ymiskar listagreinir. Hann hevur eisini verið námsferðir í fleiri londum.

Síðan Tróndur hevði sína fyrstu framsýning á ólavsøku 1958, hevur hann havt nærum óteljandi framsýningar bæði í Føroyum og uttanlands.

Síðan síðst í 80-unum hevur hann gjørt nógv við at mála á glas. Hann hevur sín egna ovn á verkstaði sínum í Kirkjubø, sum verður brúktur til endamálið.

Hansara vatns- stál- og steinskulpturar eru nógvastaðni at síggja, umframt alt tað hann hevur gjørt úr glasi.

Eisini hevur hann verið ymiskar ferðir við granskaranum og høvundanum Tim Severin, sum t.d. ferð Brandans úr Írlandi til Amerika (1977-78), ferð Sindbads Sjófara úr Oman til Kina (1982-83), ferð Jasons úr Hellas til Georgia við Svartahavið (1985), China Voyage úr Japan til Amerika yvir Stillahavið (1995), Spice Islands Voyage í Indunesia (1996).

Í sambandi við 60 ára føðingardagin, er ein framsýning á Galleri Profilen í Århus, har eisini ein framsýning hjá Ingálvi av Reyni er.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum,
sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu
tá elskaða kona, mamma, dóttir og systir okkara

**Elin S. Andersen**
Ålborg - ættað av Argjum

gjørdist sjúk og doyði í heiminum – og tá hon fór
úr Dall kirkju.

Ein serlig tøkk til tykkum, sum vóru um hana
seinastu tíðina.
Takk fyri blómur, kransar, uppringingar og minnisgávur.
Eina tøkk til tykkum øll – serliga úr Føroyum –, sum
fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Svend Erik, Gunnar, Marianna,
Metta og Jóin**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Theodor S. Heinesen**
**Vestmanna**
ættaður úr Bø, føddur 19.9.1906

andaðist 26. februar 2004.

Jarðarferðin verður 2. mars kl. 14.00
úr Vestmanna kirkju.

**Familjan**

Tey, ið vilja minnast Theodor, kunnu lata
Vestmanna kirkju eina gávu.

**Dagurin**
**2. mars. Simplicius**, deyður í 483. Pávi frá 468.